

Starvslýsing

# Fulltrúi í útlendingamálum

Eitt starv sum fulltrúi í útlendingamálum er leyst at søkja í Innlendismálaráðnum.

Tín høvuðsuppgáva verður at hava ábyrgd av málsviðgerðini í sambandi við umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá útlendingum í Føroyum. Málsøkið ber í sær samskifti á enskum og donskum.

Harumframt verður tú við til at evna til loysnir á útlendingaøkinum og at menna mannagongdir á útlendingaøkinum. Í hesum sambandi mást tú kunna tola skipanarligar broytingar á økinum.

Góðir møguleikar eru fyri viðkomandi eftirútbúgving.

**Førleikar**
Vit vænta, at tú hevur eina løgfrøðiliga ella samfelagsvísindaliga kandidatútbúgving og ert væl fyri málsliga. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt og miðvíst.

Løn sambært avtalu við avvarðandi fakfelag.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, ella Katrinu M. Johannesen, deildarstjóra, á telefon 358080.

Umsóknir við CV, prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. mars 2007 kl.12.00.

Umsóknir skulu sendast til:

Innlendismálaráðið
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

Innlendismálaráðið varð stovnað eftir løgtingsvalið í 2004. Í Innlendismálaráðnum starvast í løtuni 16 fólk.
Innlendismálaráðið umsitur umframt útlendingamál, lógarmál, kommunumál og umhvørvis-, lendis- og náttúrumál.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Tel 35 80 80, Faks 35 80 85, Postboks 159
110 Tórshavn imr@imr.fo, www.imr.fo

# Sethús í Søldafirði

Vegna Føroya Skiftirætt verður sethúsaognin matr. nr. 40b, Søldarfjarðarvegur 29, Søldarfjørður við hesum lýst til sølu.

Húsini, sum eru uml. 106 m², eru bygd í 1976.

Grundøkið er 600 m².

Húsini eru trækløddd betonghús við plastvindeygum og eru innrættaði við íbúð í miðhædd umframt minni íbúð í kjallarahæddini.

Eisini hoyrir úthús til ognina.

Áhugaði kunnu venda sær til

## Advokatvirkið

Páll Nielsen, adv.
Sigmund Poulsen, adv.
Eyðhild Skaalum, adv.
Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1, Postsmoga 85 · 110 Tórshavn · tlf. 31 21 71
telefax 31 58 74 · t-postur: advokatvirkid@advokatid.fo

# Montørar og fólk til alu-framleiðsluna

Vegna økt virksemi sóknast vit eftir montørum til ísetan av glasi og fólki til aluminium-framleiðslu at byrja skjótast gjørligt.

## Montørar

*Førleiki*
- timburmaður/snikkari
- hevur góð samstarvsevni og er røkin
- hevur koyrikort

*Starvið*
Tú kemur at koyra út til kundar at seta rútar í, umframt at gera aðrar glasmonteringar, so sum glasveggir og -hurðar

*Vit bjóða*
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv í einum faki sum er í menning
- góðar arbeiðsumstøður
- góða løn

## Arbeiðsfólk til alu-framleiðslu

Vit sóknast eftir arbeiðsfólki til okkara aluminium-framleiðslu. Somuleiðis ungum fólki, ið ynskja at koma í læru.
Vit gera hurðar, vindeygu og fasadur úr aluminium-profilum frá Schuco International

*Førleiki*
- Áhugi fyri byggivinnuni
- Er røkin og handaligur
- Góð samstarvsevni og ágrýtin

*Starvið*
Arbeiðið fevnir m.a. um tilskering og samanseting av aluminium-profilum

*Vit bjóða*
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv í einum faki sum er í menning
- góðar arbeiðsumstøður
- góða løn

Meira fæst at vita um størvini, við at venda sær til Eyðfinn Vestergaard, stjóra, á telefon 350 350 ella fartelefon 283 763

Umsókn, saman við møguligum prógvum og viðmælum, skal sendast til:

Føroya Termovirki (FTV Glas)
Sundsvegur 8
FO-100 Tórshavn

Tel: 350 350
Fax: 350 351
T-post: ftvglas@ftvglas.fo

***Umsóknarfreist:***
skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

TEAM85

FTV GLAS
FØROYA TERMOVIRKI